ítróttur
Nr. 18 • mikudagur • 25. januar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gomul Chelsea-stjørna skal hjálpa Claus og teimum

**Fyrrverandi liðformaðurin hjá enska stórfelagnum Chelsea er nýggjur jokari í felagnum Coventry. Føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen fegnast um, at Dennis Wise er komin til felagið**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Dennis Wise er ein kendur og royndur spælari. Tað er gott at hava fingið ein slíkan styrk á liðið, og vit aðrir kunnu læra nógv av einum slíkum spælara, sigur føroyski landsliðsspælarin í Coventry, Claus Bech Jørgensen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Seinasta vikuskiftið spældi fyrrverandi enski landsliðsspælarin Dennis Wise sín fyrsta dyst fyri felagið Coventry, har eisini føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen spælir.

Venjarin Micky Adams hevur áður samstarvað við Dennis Wise, og nú hevur hann fingið gamla stórspælaran til felagið at hjálpa Claus og teimum í eitt hálvt ár.

– Dennis Wise er ein kendur og royndur spælari. Tað er gott at hava fingið ein slíkan styrk á liðið, og vit aðrir kunnu læra nógv av einum slíkum spælara, sigur Claus Bech Jørgensen.

Hann stúrir als ikki fyri, at Dennis Wise skal forða fyri, at hann fær spælitíð á besta liðnum hjá Coventry.

– Vit mangla spælarar á sentrala miðvøllinum, tí tveir av teimum, sum vanliga spæla har, eru skaddir í longri tíð, og tí er tað gott at fáa Dennis Wise afturat, sigur Claus Bech Jørgensen, sum sjálvur hevur spælt nógv á júst sentrala miðvøllinum í hesum kappingarárinum.

### Legenda í Onglandi

Dennis Wise er næstan at rokna sum ein legenda í enskum fótbólti. Hann byrjaði yrkisleiðina í Southampton, men flutti longu sum 18 ára gamal til Wimbledon, har hann var partur at tí nógv umrødda Crazy Gang.

Í 1990 flutti Dennis Wise til Chelsea at spæla, og upphæddin á slakar 20 milliónir krónur, sum Chelsea lat fyri hann, var størsta keyp hjá felagnum tá – nógv er broytt síðani tað.

Dennis Wise spældi í 11 ár í Chelsea, og hann var fleiri ár liðformaður á liðnum. Hann tók millum annað í móti FA Cup steypinum í 1997 og 2000, og hann var ársins spælari í Chelsea í bæði 1998 og 2000. Í 2001 flutti hann til Leicester at spæla, og síðani hevur hann spælt fyri fleiri feløg.

### Claus var skaddur

Nú er tann 39 ára gamli miðvallarspælarin liðfelagi við Claus Bech Jørgensen, og tað gekk strúkandi í fyrsta dystinum hjá Wise við Coventry. Teir spældu ímóti Derby og vunnu heili 6-1.

Dennis Wise spældi við, men honum ikki heilt ólíkt, hevur hann longu fingið leikbann til næsta dystin. Venjarin hjá Manchester United, Sir Alex Ferguson, segði einaferð um Dennis Wise, at hann kundi byrja ein bardaga í einum tómum húsi.

– Jú, hann hevur framvegis tempramment, men enn kenna vit hann so lítið, tí hann hevur vant við í minni enn eina viku, sigur Claus Bech Jørgensen.

Føroyski landsliðsspælarin spældi ikki við Coventry farna vikuskiftið, tí hann hevði ein minni skaða, men hann er komin fyri seg aftur og roknar við at spæla aftur um vikuskiftið í ensku steypakappingini.

# Hóttir við at koyra felagið hjá Toda á heysin

**Fyrrverandi spælari hjá norska felagnum Start heldur, at felagið skyldar honum 1,3 milliónir krónur, og nú hóttir hann við at krevja felagið koyrt á heysin, um teir ikki gjalda honum upphæddina**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Donatas Vencevicius er ein misnøgdur maður. Fótbóltsspælarin, sum eina tíð spældi saman við Toda Jónsson í FC Keypmannahavn, hevur eisini spælt fyri núverandi felagið hjá Toda, Start í Noregi.

Har steðgaði samstarvið fyri tíð, og nú heldur Donatas Vencevicius, at Start skyldar honum 1.3 milliónir krónur fyri sáttmálan, sum hann hevði fyri felagið.

– Vit ælta okkum als ikki at oyðileggja nakað fyri Start, nú tað gongur væl hjá teimum ítróttarliga, men teir skylda okkum pengar, og tað skulu teir gjalda, sigur umboðsmaðurin hjá Vencevicius, Stan Stancheff, við eitt norskt blað.

Um tað er neyðugt ætlar hann at krevja Start koyrt á heysin.

### Alt er í lagi

Dagligi leiðarin í Start heldur, at felagið hevur øll viðurskifti við Donatas Vencevicius í lagi, og hann sigur seg einki kenna til hóttanina um at koyra felagið á heysin.

– Eg stúri ikki fyri hesum, tí vit hava borið okkum rætt at. Vit hava goldið Donatas Vencevicius 600.000 í endurgjalda, og harvið fullu allar aðrar avtalur burtur, sigur Harald Andersen við Nettavisen.

## Jón kappast um DM

**Jón Rosenblad fer um vikuskiftið at kappast um meistaraheitið í innandurarógving í Danmark. DM-kappingin verður hildin í Kerteminde, og Jón skal kappast við fleiri enn 500 rógvarar**

RÓGVING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Leygardagin og sunnudagin verður kappast um DM-heitið í innandurarógving. Sterkasti føroyski rógvarin í hesum ítrótti er 27 ára gamli Jón Rosenblad úr Lamba, og hann verður við í kappingini um vikuskiftið, skrivar heimasíðan hjáHavnar Róðrarfelag.

500 rógvarar bjóða seg fram í DM-kappingini, og kappast verður í ymiskum bólkum. Jón Rosenblad skal verða við í kappingini á 2000 metrum fyri mans, sum viga meira enn 75 kilo.

Tað varð eisini í hesari kappingini, at Jón í fjøg bleiv numm 5 í DM. Síðani hevur hann betra munandi um tíðina hjá sær, og tí kann úrslitið gerast enn betri hesaferð.

Innleiðandi kappingarnar verða leygardagin, og 10 teir bestu rógvararnir fara víðari til finalurnar, sum verða hildnar sunnudagin.

Tað ber til at lesa meira um DM-kappingina á heimasíðuni

*www.modest-sport.dk*

## Ári heldur fram sum formaður

Nevndin í FS Vágum 2004 hevur skipað seg eftir aðalfundin í farnu viku. Allir teir fimm menninir, sum hava sitið í nevndini seinastu tíðina, vóru afturvaldir, og Albert Ári Thomassen heldur fram sum formaður. Atli Gregersen er peningarøkil, Heðin Jørgensen skrivari, og Heini Holm og Bjarni Prior eru nevndarlimir.

FS Vágar 2004 spælir í næstbestu føroyski deildini, og Bill McLeod Jacobsen heldur fram sum venjari hetta kappingarárið. Málið hjá FS Vágum er uppflyting til bestu deildina.